


## Heimsins longsta

Í gjár varð tann nýggja rørleiðingin, sum skal flyta gass av norsku gassleiðunum til Bretlands, latin upp. Leiðingin, sum hevur fingið heitið Langled, er tann longsta gassrørleiðingin, sum liggur eftirt havbotninum. Hon er 1.200 kilometrar long. Langeled hevur kostað 17 milliardir norskar krónur og er før fyri at nøkta 20 prosent av bretska gasstørvinum. Gassið í leiðingini kemur av Ormen Lange-leiðini.

## Hálv mia til menning

Danska stjórnin hevur gjørt av at játta eina hálva milliard krónur til at menna fiski- og alivinnuna tey bæði næstu árini, og hetta er tann størsta játtanin av hesum slagnum nakrantíð. Pengarnir skulu brúkast til virðisøking, men ætlanin er eisini, at teir skulu gera fiski- og alivinnuna til eitt aktiv fyri útjaðaran, og harafturat skal játtanin stimbra frítíðarfiskivinnuna í sambandi við ferðavinnuna. ES rindar helmingin av játtanini.
(Kelda: www.industry.fo)

# FAME - stór verkætlan

**Sangleikurin FAME er fingið í lag við einum samstarvi millum fyrireikararnar og stuðlar. Nógvur peningur krevst til eina slíka verkætlan, hóast nógv sjálvboðið arbeiði verður gjørt. Tryggingarfelagið Føroyar leggur seg serliga eftir at stuðla evnaríkum ungdómi**

VINNULÍV
*Orð & mynd: Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*Gunnar í Liða, forstjóri í Tryggingarfelagnum Føroya, og Herleif Hammer, verkætlanarleiðari fyri FAME, skriva undir avtalu um stuðul*

Tryggingarfelagið Føroyar er høvuðsstuðul hjá sangleikinum FAME, sum Føroya Studentaskúli og HF-skeið í Hoydølum setur upp og sum verður spældur í Norðurlandahúsinum 17.-23. november.

Fríggjadagin undirskrivaðu Gunnar í Liða, forstjóri og Edvard Heen, varastjóri í Tryggingarfelagnum Føroyum, og Herleif Hammer, verkætlanarleiðari fyri FAME, avtalu um stuðul. Tey frá Tryggingarfelanum siga, at tey hava valt at stuðla sangleikinum, tí felagið fegin stuðlar ungdóminum, og í hesum førinum heldur felagið tað vera vert at stuðla ungum evnaríkum fólkum og vera við til at profilera studentaskúlan og næmingarnar har. Tryggingarfelagið Føroyar ger nógvar stuðulsavtalur og vil fegin náa breitt út um samfelagið við sínum stuðli. Við stuðlinum til FAME vil felagið vera við til at menna evnini hjá ungum miðnámsskúlanæmingum innan palllist og geva teimum nýggjar upplivingar og royndir og høvi til at síggja nýggjar møguleikar.

- Tryggingarfelagið leggur seg eftir at stuðla list og serliga ungdómi. Vit halda, at hendan verkætlanin er sera spennandi, og vit vilja fegin hjálpa teimum at gera hana til veruleika, sigur Edvard Heen.

### Stórur sangleikur

Fyrireikararnir handan FAME eru glaðir fyri samstarvið við Tryggingarfelagið Føroyar, sum tryggjar fíggjarliga grundarlagið undir leikuppsetingini. Sjálvt um tey umleið 80 fólkini, sum fara at vera á pallinum, eru óløntir studentaskúlanæmingar, og lærararnir á skúlanum gera eitt stórt arbeiði fyri hesum sangleikinum, so er neyðugt at leiga fólk inn til uppgávur, sum krevja størri arbeiði og førleika. Har ímillum er leikstjórn, koreografi, týðing, sangfrálæra, tilrættalegging av tónleiki og annað. Alt í alt er sjálv verkætlanin eitt tungt tak at lyfta, og Føroya Studentaskúli er fegin um at Tryggingarfelagið Føroyar vil hjálpa við at lyfta hana, siga fyrireikarunum.

Kaupthing:

## – Tilvitað tá ið vit lata stuðul

**Kaupthing fer tilvitað inn og stuðlar teimum málbólkunum, sum tey vilja náa til tess at gerast fyritøkan skal gerast kend í hesum málbólkinum. - Vit stuðla breitt teimum tiltøkum sum vit velja at stuðla heldur enn at lata lítið til nógv tiltøk, sigur Henny á Líknargøtu frá Kaupthing**

VINNULÍV
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Henny á Líknargøtu, samskipari í Kaupthing, heldur, at stuðulspolitikkurin hjá nógvum fyritøkum er broyttur.

- Fyrr var stuðulin latin meira breitt, og øll fingu ein part av køkuni. Tað var stuðlað eitt sindur til Skála og eitt sindur til HB til dømis.

- Nú fara vit meira tilvitað inn og stuðla einum størri tiltaki og stuðla tí meira umfatandi. Vit "co-branda" við tiltakið, sum vit stuðla. Vit eru meira tilvitað um, hvørjum vit stuðla, og vit fara sjálvi út og velja, hvørjum vit skulu stuðla, sigur hon.

### Vilja síggja fyrimunir

Kaupthing hevur ávís krøv til umsóknirnar um stuðul.

- Ein hvør fyritøka stuðlar, tí at hon væntar at fáa fíggjarligan vinning burturúr. Soleiðis er eisini hjá okkum. Vit vilja síggja í umsóknini, hvat vit kunnu fáa afturfyri peningin, sum vit lata, sigur Henny.

Kaupthing setir langtíðar málsetningar, og stuðulspolitikkurin gongur eisini undir hesa ætlan.

- Vit seta okkum málsetningar og greina síðani, hvussu vit kunnu náa teir. Tað ræður um hjá fyritøkuni at seta eitt frámark. Vit stuðla kanska miðvíst einum málbólki, sum vit vilja náa, og soleiðis gerast vit kend í hesum málbólkinum og fáa eitt ávíst "good-will" frá teimum, greiður Henny frá.

Føroya Sparikassi:

## – Umdømið bygt upp yvir langa tíð

**Marner Jacobsen, stjóri í Føroya Sparikassa, sigur, at fíggjarlig atlit verða tikin, tá ið teir lata stuðul, og tí skal vinningur helst koma burturúr í síðsta enda. Báðir partar fáa nakað burturúr, sigur hann**

VINNULÍV
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Sosialurin hevur sett seg í samband við Marner Jacobsen, stjóra í Føroya Sparikassa, og spurt um teirra hugburð mótvegis stuðli av ymsum tiltøkum. Hann greiður soleiðis frá teirra stuðulspolitikki:

– Føroya Sparikassi er ein fyritøka, so vit hyggja sjálvandi altíð at, hvat kann vera ein fíggjarligur vinningur fyri okkum. Tað er tó torført at uppgeva, hvussu nógv tú fært aftur í reiðum peningi fyri stuðla einumhvørjum. Men samanumtikið skal tað helst geva vinning, sigur hann.

### "Vinn/vinn"-støða

Tað verður nógv tosað um hugtakið "good-will", og tað er eisini nakað, sum tey í Sparikassanum er tilvitað um.

– Tá ið vit stuðla einum hvørjum, kunnu vit vænta okkum "good-will" frá hesum bólkinum afturfyri, og tað hevur sjálvandi stóran týdning fyri okkum. Vit leggja okkum serliga eftir at stuðla tiltøkum í Føroyum, sum koma føroyingum til góðar, og tí stuðla vit ikki uttanlandsferðum hjá flokkum. Annars er tað mangan ein einstøk meting av umsóknini.

- Mangan er talan um eina "vinn/vinn"-støðu, tí at vit fáa okkurt burturúr at stuðla einum tiltaki, og fyriskipararnir fáa eisini okkurt burturúr, tí at tað hevði kanska als ikki verið gjørligt uttan stuðul, sigur Marner.

Marner heldur ikki, at tað hevur so nógv at siga fyri umdømið sæð yvir stutta tíð, um teir stuðla einum tiltaki.

– Umdømið verður bygt upp yvir langa tíð, og tí haldi eg ikki, at tað hevur so nógv at siga, um vit stuðla einum tiltaki ella ikki. Men tað hevur sjálvandi týdning yvir eitt longri tíðarskeið.



Føroya Sparikassi hevur altíð stuðlað nógvum tiltøkum. Vit hava eisini ein gávugrunn, sum gevur til ymisk vælgerandi endamál hvørt ár uttan at hava fíggjarlig atlit, sigur hann at enda.